# ítróttur

Nr. 237 • fríggjadagur • 10. desember 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

Kyndil-Søljan 21-37 (10-21):

# Leikandi lætt

**Kyndil tykist hava mist góða stríðsviljan, sum tær høvdu fyrr í ár. Mikukvøldið var tað Søljan, sum vann sær lættan sigur**

HONDBÓLTUR

*Jákup Mørk*

Tað var ongantíð nakað serligt av spenningi í Høllini á Hálsi í Havn mikukvøldið. Longu eftir fimm minuttum stóð 0-5 á talvuni, og tó at Kyndil kom nakað betri við eftir hetta, so vaks munurin støðugt.

Serstakliga lá væl fyri hjá Søljuni at gera sær dælt av kontra-álopum, og ikki minst kundi kvika Nicoleta Radu Hansen ferð eftir ferð renna einsamøll móti Guðrun í Lágabø, og mest sum hvørja ferð við sama úrslitið.



*Søljan hevði alla tíðina gott tak á Kyndli, sum ikki formáddi sær stórvegis í dystinum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Og tó at hetta so ikki bilti hesaferð, so er einki at ivast í, at tað fer at merkjast hjá Søljuni, at tær soleiðis mugu vera ein av stuðulsleikarunum fyriuttan í komandi dystunum.

### Login burturi

Hjá Kyndli tykist støðan nú vera tann, at login í stríðsviljanum, sum annars hevur verið heilt góður í heyst, spakuliga er um at slókna. Berandi kreftirnar á liðnum eru snøgt sagt ov fáar, og tá talan samstundis er um blaðungar leikarar, kann vera skjótt, at høvdini fara at hanga.

Trý stig eru tó komin á kontina higartil, og enn resta dystir móti bæði StÍF og Tjaldri í grundspælinum, so tað kann hóast alt væl verða, at Kyndil fer at fáa sær nøkur stig afturat, áðrenn farið verður undir endaspælið.

### Tungur missur

Tað var tó ein dyggur smeitur hjá Søljuni, at tær um miðjan fyrra hálvleik mistu Arnleyg Haraldsen. Í hendiligum samanstoyti við álopsleikara hjá Kyndli kom hon púrasta skeivt fyri, og við upp-bólgnaðum knæ varð hon fyrst borin av vøllinum og síðani send á sjúkrahúsið. Haðani vóru boðini seinni, at liðbondini í knænum eru toygnað nakað, og tí er ikki væntandi, at hon verður aftur á vøllinum fyrstu tveir mánaðirnar.

## FAKTA UM DYSTIN

**Kyndil-Søljan 21-37 (10-21)**
**Málskjúttar**
**Kyndil:** Randi Wardum 9(3), Ann Mari Wang 8(2), Hildur Mikkelsen 3, Súsanna Petersen 1
**Søljan:** Nicoleta Radu Hansen 18, Heidi Maria Akselsen 8, Hertha Simonsen 5, Lina Andriulyte 3, Fía Selma Nielsen 2, Kristianna Petersen 1
**Brotskøst:** Kyndil 6, Søljan 3
**Útvísingar:** Kyndil 1, Søljan 2
**Dómarar úr Tjaldri:** Kári Hansen & Dánjal Hansen. Høvdu ikki nakrar trupulleikar av uppgerðini sum so, men høvdu tó fleiri beinleiðis feildømingar

### Hondbóltur

SUNSET KAPPINGIN
KVINNUR

| | dystir | v | - | j | - | t | v. mál | t. mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Neistin | 9 | 7 | - | 0 | - | 2 | 277 | 191 | 86 | 14 |
| 2 VB | 7 | 6 | - | 0 | - | 1 | 214 | 142 | 72 | 12 |
| 3 Stjørnan | 6 | 6 | - | 0 | - | 0 | 163 | 123 | 40 | 12 |
| 4 Søljan | 9 | 5 | - | 0 | - | 4 | 260 | 219 | 41 | 10 |
| 5 VÍF | 9 | 5 | - | 0 | - | 4 | 218 | 197 | 21 | 10 |
| 6 StÍF | 8 | 1 | - | 1 | - | 6 | 167 | 212 | -45 | 3 |
| 7 Kyndil | 8 | 1 | - | 1 | - | 6 | 152 | 229 | -77 | 3 |

**Flogbóltur - Meistaradeild, menn**

| | d | v | - | t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 SÍ | 7 | 6 | - | 1 | 19 | 7 | 12 | 12 |
| 2 Mjølnir | 7 | 5 | - | 2 | 17 | 9 | 8 | 10 |
| 3 Fleyr | 7 | 4 | - | 3 | 15 | 11 | 4 | 8 |
| 4 ÍF | 6 | 1 | - | 5 | 5 | 16 | -11 | 2 |
| 5 Fram | 7 | 1 | - | 6 | 6 | 19 | -13 | 2 |

## Mjølnir halda trýstinum

Mikukvøldið varð ein framskundaður dystur leiktur í meistaradeildini hjá monnum.

Hesin var millum Fram og Mjølnir. Á stigatalvuni er munurin millum liðini bæði stórur, og dysturin mikukvøldið gjørdist sum so bara ein staðfesting av muninum.

Mjølnir hevði ongan sum helst trupulleika við at vinna ein tryggan 3-0 sigur, soleiðis at teir framhaldandi halda trýstinum á oddaliðnum, SÍ.

-jm

Tjaldur-VÍF 11-31 (5-13):

## VÍF vann eisini stórt

Tjaldur tykist als ikki hava nakað at gera í bestu kvinnudeildini. Mikukvøldið tóku tær ímóti VÍF, sum at kall er í eini endurbyggingarstøðu, og her var eingin sum helst ivi um, hvønn veg dysturin skuldi fara.

Frá byrjan setti VÍF seg á dystin, og uttan at tær veruliga spílaðu seg út, øktist munurin bara, sum fráleið.

Tað er einki at ivast í, at talan er um góðan styrk, nú vestmannakvinnurnar aftur hava fingið Fríðu Marjunardóttir á liðið. Hesaferð var eisini í sonnum málhýri, og eins og Ioana Rápa skeyt hon 10 mál fyri VÍF.

Tíverri hava vit ikki fingið nakran dómaraseðil úr Runavík, so hagtølini fyri dystin mugu bíða.

-jm

# Jólasvimjikapping

SVIMJING

*tíðindaskriv*

Fríggjakvøldið 10. desember kl. 17.30 verður skipa fyri árligu jólasvimjikappingini fyri svimjarum hjá Fuglafjarðar Svimjifelag. Kappingin verður í svimjihøllini í Fuglafjarðar Skúla

Allir svimjarar hjá FS eru tilmeldaðir, umleið 100, og koma svimjararnir at svimja tvær kappingar í part. Eisini verður skipa fyri onkrum stuttligum svimjitiltakið. Allir svimjarar sum luttaka fáa heiðursbræv.

Undanfarin ár tá kappingin hevur verið, eru jólamenn komnir í svimjihøllina og allir svimjararnir hava fingið okkurt gott , og roknast kann við at teir eisini koma á gátt fríggjakvøldið, og eru øll hjartaliga vælkomin í høllina.



*Fuglafjarðar Svimjifelag fer at hava árligu jólasvimjikappingina komandi vikuskiftið*